# Árni til Rhodos við flogbóltslandsliðnum



*Kambsdalsbúgvin, Árni Petersen, fer ein túr til Rhodos í summar at umboða føroyska flogbóltslandsliðið*

**Navn:** Árni Jóhan Petersen
**Bústaður:** Kambsdalur
Aldur: 25 ár
**Starv:** Sølumaður hjá proviantdeildini hjá Haraldsen
**Frítíðarítriv:** Ítrottur, serliga flogbóltur og fótbóltur

*Nær fært tú summarfrí í ár?*
Eg fái summarfrí síðst í juni

*Hvussu fert tú at halda summarfrítíðina?*
Summarfrítíðin hjá mær í ár verður eitt sindur annarleiðis enn fyrr, tí eg skal við flogbóltslandsliðinum til Rhodos. So ein partur av frítíðini verður nýttur til tað endamálið, meðan restin fer til festivalar o.l.

*Hví hevur tú valt at gera júst hetta*
Eg haldi tað vera spennandi at sleppa við til Oyggjaleikirnar og ein æra at umboða Føroyar á henda hátt. Ítróttur fyllir ein stóran part av mínum lívi, og júst hetta vil eg fegin brúka mína frítíð uppá, um so skal verða!

*Plagar tú at ferðast uttanlands um summarið?* Ja, eg plagi at gera ein túr av og á til Miðalhavið, tí har kann man fáa nakrar sólstrálur. Eisini er gott at sleppa burtur frá gerandisdegnum eina løtu.

*Plagar tú at ferðast í Føroyum um summarið?* Nei, eg ferðist ikki so nógv í Føroyum. Tað er í samband við onkran dyst, serliga í Suðuroy, eg havi ferðast. So plagi eg eisini at ferðast runt til festivalar og stevnur kring landið.

*Ferðast tú hinar árstíðirnar?*
Eg ferðist nokk bert um summari, men møguliga fari eg at halda jól og nýttár aðrastaðni langt burtur í ár.

*Hvat er títt dreymaferðamál?*
Fiji ella Cuba




**STUBBIN** Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo
www.stubbin.fo







**NILAN:**
**Ventilatións-verk við innbygdari hitapumpu**



**TRYGGJAR GOTT INNIKLIMA VIÐ AT:**
- Tryggja støðuga útskifting av luftini
- Hita frísku luftina, sum verður blást inn
- Avfukta og endurvinnur hitan í inniluftini
- Avmarka ovurviðkvæmið

**Verður uppsett av góðkendum montøri**
**Reno-Vent** Sp/f
Telefon 47 81 70

**Ferðast í Vágum & Mykinesi**




Vága Kunningarstova
Tel 333455 www.vagar.fo

**VIT SIGLA ÚR HESUM STØÐUM**
KLAKSVÍK | LEIRVÍK | EIÐI | GJÓGV
- Bátur til 12 fólk
- Skipaðir túrar
- Leigutúrar
- Fiskitúrar



Viljin Tours
796 Húsar Tel 222060 www.viljin.com

**Reykjavík ½ marathon**
**18. august 2007**
**kr. 4.995,-**
**úr Vágum 17. august og heim aftur 21. august**

**Íroknað prísin er:**
- Flogferð Vágar-Reykjavík og aftur við ferðaavgjøldum
- Gisting í 4 nætur í Fjørukrónni í einakamar við morgunmati
- Luttøkugjald til hálv-marathon í Reykjavík
- Víkingadøgurði í Fjørukrónni

FLOGFELAG FØROYA
P/F Flogfelag Føroya • Hoydalsvegur 17 • 100 Tórshavn • Tel. 34 00 00 • Fax 34 00 11 • booking@ff.fo